

Anker Mortensen sýnir fram prent av koparplátum úr Hovi



Myndin »Emmaus« hjá Torbjørn Olsen er ørkymlandi og áhugaverd



Tummas Jákup Thomsen: »Mastur«

ta snøggu skránna og eina framúrskarandi flotta plakat). Aggi skal helst ansa sær fyri tí vakra og ov meinaleysa. Hon sýnist mest spennandi í tí svarthvítu myndini, sum hevur ein serligan dynamikk næstan sum í teimum meistarligu svarthvítu myndunum hjá Elinborg Lützen

## Tað ítøkiliga og tað óítøkiliga

Torbjørn Olsen hevur í ár 10 verk við á Heystframsýningini og tó, at tey eru gleðilig tekin um, at skapari teirra er í sera góðum formi, nýttust øll tíggju ikki at verið við á framsýningini.

Hetta sama er galdandi fyri tey flestu av hinum framsýnarunum, at ov nógv verk eru við. Í staðin fyri at gera tað til eina hampiliga góða søluframsýning, átti Heystframsýningin strangliga at satsa uppá eina framúrskarandi listarliga heild, men hetta fellur eyðsýniliga ikki lætt hjá listafólkunum sjálvum at gera, og kanska er tað heldur ikki teirra ætlan við listabólkinum.

Myndirnar hjá Torbjørn Olsen av kvinnum, landsløgum osfr. eru sum heild væleydnaðar. Abstrakta kvinnumumyndin í bláum og gulgrønum upp móti reyðum og violettum er serstakliga góð, frí og koloristiskt sterk. Spurningurin er bara hvørt kyrrluta- og model-studiumyndevnini eru ov lætt-fingin til tess at forloysa serligu evni listamansins. Torbjørn dugir fantastiska væl at mála størri, samansettar og eisini torførar myndir sum til dømis bólkaportrett, ið krevja stórt listarligt yvirskot, men eisini sans fyri psykologiskum spenningi, sum Torbjørn hevur víst, at hann hevur í altartalvum o.ø. Tíanbetur eru tvey tílík bólkaportrett við á Heystframsýningini; eitt av teimum trimum krossfestu á Golgata og ein sera áhugaverd mynd, ið lýsir tríggjar mans við eitt borð.

Fyrst helt eg hetta vera ein lýsing av einum lutfalsliga skramblutum annandags drykkjulagi m.a. av tí, at tann eini av monnunum greidliga er í gulum slobbrokki (!), men skjótt gjørdist eg varug við ein serligan eitt sindur óhugnaligan og samstundis hátíðarligan ljóm í myndini, sum saman við ljósinum og monumentala bygnaðinum sigur okkum, at okkurt serligt er áfatt. Og rætt er, tí trívur tú í myndaskránna, stendur heitið á myndini at vera »Emmaus«.

Tað er eyðkent fyri Torbjørn, at hann hevur valt at mála ta mystisku løtuna millum tað ítøkiliga og tað óítøkiliga, tá undrið gongur upp fyri Keopasi og Símuni, at tað er tann krossfesti Jesus, teir eta saman við: »Táið Hann so sat til borðs við teimum, tók Hann breyðið, signaði og breyt tað og gav teimum. Tá vórðu eygu teirra latin upp, og teir kendu Hann; men so hvarv Hann...«.

Myndirnar hjá Mariusi Olsen eru djúpt melankolskar og góðar og sama góða viðmæli fáa Zacharias Heinesen, Bárður Jákupsson og Hjørdis Haack, sum øll eru framúr góð listafólk, ið Heystframsýningin veitir okkum møguleika at uppliva ár eftir ár. Hesi seinastu fimm árini hava vit upplivað eina rúgvu av dygdargóðari yrkislist í Listahøllini, sum eisini hevur verið karmur um nøkur av høvuðsverkunum innan føroyska myndlist árini 2004-2009.